# Gongur væl hjá Laursen

Seinastu árini hevur danski verjuspælarin í Aston Villa, Martin Laursen verið illa plágaður av skaðum. Í ár tykist Laursen tó vera komin ordiliga av við skaðarnar, og hann hevur eisini verið fastur maður í verjuni hjá felagnum úr Birmingham. Áskoðararnir hjá Aston Villa eru eisini glaðir fyri Laursen, tí á heimasíðu felagsins hava áskoðararnir valt Laursen til besta spælaran hjá felagnum í september mánaði. Laursen fekk heili 63% av stemmunum.



# EB/Streymur tosar við Sigfríða

Seinastu fimm árini hevur póllendingurin Piotr Krakowski verið venjari hjá EB/Streymi, men hann heldur ikki fram í felagnum. Áhaldandi søgur vilja síðani verða við, at nýggjur venjari hjá EB/Streymi verður Sigfríður Clementsen, sum í løtuni er venjari hjá AB. Sigfríður vil bara staðfesta, at hann ikki verður venjari á Argjum næsta kappingarár. Rólant Højsted, formaður í EB/Streymi, sigur, at partarnir høvdu tosað saman, men at onki ítøkiligt enn er komið burturúr.

SÍ-Mjølnir 3-1 (24-26, 25-15, 25-8, 25-16)

## SÍ basti Mjølni

**Kvinnurnar hjá SÍ skuldu brúka eitt sett, áðrenn tær vóru rættiliga klárar til nýggja kappingarárí. Men eftir at tær høvdu tapt fyrsta sett ímóti Mjølni, var eingin ivi um úrslitið**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Ein dystur í fyrsta umfari í meistaradeildini hjá kvinnum var í fimleikahøllini í Sørvági leygardagin, har SÍ tók ímóti Mjølnir. Sjálvt um SÍ helst var favorittur undan dystinum, so var tað tó Mjølnir, sum byrjaði dystin betur.

Fyrsta settið var ógvuliga javnt, og liðini fylgdust at kalla allan vegin. Móti endanum dugdi Mjølnir tó betur at halda høvdið kalt, so tær vunnu fyrsta sett 26-24.

Hetta fekk tó SÍ at vakna, og nú vóru tær klárar. Í øðrum settið gekk aftur javnt á eina løtu, men so fór SÍ frá Mjølnir. Úrslitið gjørdist 25-15, og nú var SÍ komið í gongd. Í 3. setti var slett eingin ivi. Her førdi SÍ allan vegin, og at enda vunnu tær heili 25-8.

Nú skuldi Mjølnir vinna 4. sett, um tær skuldu hava møguleika at vinna dystin, men soleiðis bleiv ikki. Enn einaferð var SÍ væl sterkari, og hetta settið vunnu tær 25-16. Sostatt hevur SÍ fingið eina góða byrjan upp á nýggja kappingarárið.

Dráttur – TB 3-1 (25-14, 18-25, 25-14, 25-14)

# Dráttur kom væl frá byrjan

**Dráttur vann ein rættiliga tryggan sigur í fyrsta umfari í meistaradeildini hjá kvinnum um vikuskiftið, tá TB var á vitjan. Sjálvt um TB vann eitt av settunum, so var Dráttur tó greitt oman á at kalla allan dystin**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Tvey av liðunum, sum síðstu árini hava verið við til at mynda oddin í føroyskum kvinnuflogbólti, hittust í høllini á Giljanesi u vikuskiftið. Her tók Dráttur ímóti TB, og sjálvt um hesir dystirnir ofta hava verið rættiliga spennandi, so var spenningurin tó ikki tann heilt stóri henda dagin.

Sjálvt um TB megnaði at vinna eitt av settunum, so var Dráttur oman á at kalla allan vegin, og 3-1 sigurin hjá teimum var greitt uppiborin.



*Dráttur vann ein rættiliga sannførandi 3-1 á heimavølli ímóti TB, tá fyrsti umfar í meistaradeildini hjá kvinnum var á skránni um vikuskiftið*

### Dráttur kom væl frá byrjan

Tað var eisini heimaliðið, sum legði betur fyri. Tær settu seg á dystin frá byrjan av, og tíðliga í fyrsta setti høvdu tær vunnið sær eina rættiliga trygga leiðslu. Hesa megnaðu tær eisini at økja um restina av settinum, so tá settið kom at enda, hevði Dráttur vunnið ein sannførandi 25-14 sigur.

Hetta vildi TB tó ikki lata sær lynda við. Tær komu út sum eitt ódnarveður í øðrum setti, og nú sá nógv betri út hjá kvinnunum av Tvøroyri. Tað gekk annars rættiliga javnt á í øðrum setti, men tað tóktist tó alla tíðina, sum TB hevði munin. Móti endanum av settinum byrjaði TB eisini at fara frá Drátti, og kvinnurnar úr Vágum megnaðu ikki at svara aftur. TB vann annað sett 25-18, og so var aftur púra opið á Giljanesi.

### Dráttur avgjørdi

Í 3. setti raknaði Dráttur tó rættiliga við aftur. Nú vóru tað aftur tær, sum settu seg á dystin, og gongdin var at kalla tann sama sum í fyrsta setti. Tað gekk ikki long tíð, fyrrenn Dráttur hevði lagt seg á odda, og spakuliga øktu tær um leiðsluna, soleiðis at eingin ivi var um úrslitið móti endanum av settinum. Dráttur vann nevniliga eisini triðja sett sannførandi 25-14, og nú sá ikki so gott út hjá TB.

Í 4. setti royndi TB at stríðast av øllum alvi, men munurin var tó ov stórur á liðunum. Dráttur var alla tíðina eitt fet framman fyri, og sum tað leið út á fjórða sett gjørdist greitt, at her hevði TB ongan møguleika. Dráttur økti støðugt um leiðsluna, og fyri triðju ferð henda dagin eydnaðist Drátti at vinna 25-14, og sostatt vunnu tær eisini dystin 3-1.

Við sigrinum hevur Dráttur sostatt fingið eina góða byran upp á kappingina, og tað tykist ikki vera nakar ivi um, at tær fara at spæla við heilt frammi í oddinum í ár.

KÍF – Fleyr 3-0 (25-10, 25-18, 25-17)

# KÍF bukaði nýggja liðið

**KÍF-kvinnurnar vunnu sannførandi í sínum fyrta dysti á árinum, tá tær tóku ímóti Fleyr, sum aftur var at síggja í meistaradeildini. Størsti spurningurin eftir dystin er, hvat Fleyr ger í meistaradeildini**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Eftir ársaðalfundin hjá Flogbóltssambandinum fyrr í ár var tað serliga eitt mál, sum bleiv nógv umrøtt á fundinum og eftir fundin. Hetta snúði seg um besta kvinnuliðið hjá Fleyr, sum fekk meiriluta fyri at flyta upp í meistaradeildina, sjálvt um tær ikki høvdu vunnið 1. deild.

Leygardagin skuldi Fleyr so fyri fyrstu ferð í eldin í ár, tá tær vitjaðu í Kollafirði hjá KÍF, og eftir dystin kann bert staðfestast, at munurin á Fleyr og KÍF var risastórur. KÍF vann dystin 3-0, og ivi var ongantíð um úrslitið.

### KÍF legði hart út

KÍF legði fyri sum eitt ódnarveður leygardagin, og í fyrsta setti fekk Fleyr ongantíð fótin fyri seg. KÍF legði seg á odda beinanvegin, og tær øktu eisini støðugt um leiðsluna ígjøgnum settið. Tá fyrsta sett var komið at enda, hevði KÍF vunnið 25-10, og so var støðið lagt fyri dagin.

Í øðrum setti var Fleyr heldur betri við. Tær royndu veruliga at geva KÍF-kvinnunum mótstøðu, men tá alt kom til stykkis var munurin millum liðini bara ov stórur. KÍF vann hetta settið 25-18, men hevði tað ikki verið tí at fleiri av royndu KÍF-leikarunum royndu at gera ymiskt smart hetta settið, so kundi sigurin verið væl størri.

Í triðja setti valdi KÍF at skifta ein stóran part av leikarunum út. Hetta skapti eitt sindur av forvirringi fyrstu løtuna, men tá hesar fyrst vóru blivnar heitar, so fór KÍF aftur støðugt frá Fleyr. Úrslitið av 3. setti gjørdist 25-17, og við hesum vann KÍF sín fyrsta dyst sannførandi.

Hjá Fleyr sá hinvegin ikki serliga lovandi út. Eingin ivi er um, at ungu leikararnir í felagnum hava góð evni, men at blaka eitt heilt lið av blaðungum leikarum í eldin í meistaradeildini tykist ikki vera rætta loysnin.

Nú skal Fleyr sjálvandi ikki avskrivast eftir fyrsta dystin-, men eftir spælinum í Kollafirði at døma, so fer liðið at fáa tað sera, sera trupult.